# Enn ein góður steypadagur

**FLOGBÓLTUR** Eisini dagurin í gjár hjá flogbóltinum gekk væl, tá seks steypafinalur hjá yngru liðunum vóru á skránni. Nógv fólk var í høllini og karmarnir teir somu sum hjá teimum vaksnu

Hilmar Jan Hansen

Fyri viku síðani hevði hondbólturin ein fantastiska væl eydnaðan steypadag fyri tey yngru, og í gjár hevði flogbólturin ein sama slag dag í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, tá steypafinalurnar hjá gentum og dreingjum 14 ár, gentum og dreingjum 16 ár, kvinnu- og mansunglingum vóru á skránni.

Akkurát sum leygardagin, tá steypafinalurnar hjá teimum vaksnu vóru, hevði Flogbóltssambandið syrgt fyri best hugsandi karminum um finalurnar. Her var innmarsjur við sløktari høll, men flakkandi ljóskastarum, dunandi rútmur í hátalarunum og alt tað, sum hoyrir til.

Gjøgnum dagin var nógv fólk í høllini, og kanska serliga til gentu- og dreingjafinalurnar var talan um trivaliga áskoðarafjøld. Tey vóru vitni til bæði spennandi og tættar finaludystir, ið dómarabólkurin tók sær av, so talan var um royndar dómarar í øllum dystunum, sum vóru spældir á altjóða teraflex-gólvinum. Somuleiðis vóru skrivarar og bóltgentur og -dreingir.

Tá avtornaði, hilnaðist best hjá SÍ, ið vann báðar dreingjafinalurnar, bæði hjá teimum 14 og 16 ára gomlu, og Fleyr, KÍF, Mjølnir/ÍF og TB/Fleyr A vunnu hvør sína finalu. Í finalunum ráddi um at vera best av trimum settum, og í trimum av dystunum var so javnt, at eitt triðja sett mátti til.

Best mannaða felag var TB, sum hevði lið í fýra av teimum seks finalunum, umfram at hjá mansunglingum var talan um eina reina TB-finalu, har liðini bæði tó eisini høvdu onkrar spælarar frá Fleyr við, tí samstarv er millum feløgini.

Flogbóltssambandið letur sera væl at degnum, tí alt gekk sum fótur í hosu, og hetta tiltakið er heilt vist komið fyri at verða verandi. Hóast talan var um seks finalur og eina rímiliga tætta dystarskrá, vóru seinkingarnar einki at tosa um. Tann sætta og síðsta finalan var seinkað bara fimm minuttir, so væl gekst at halda tíðarætlanina.

*hilmarjan@sosialurin.fo*



**GENTUR 14 ÁR: FLEYR**

**(vann 25-18, 27-29, 15-13 á Ternuni)**

*Aftast frá vinstru: Beata Leifdóttir Johansen, Judit Tummasardóttir, Krista Meinhardsdóttir, Ása Maria Enni, Rannvá Mortenen. Mittast frá vinstru: Marjun undir Kletti, Sóley Eliasdóttir, Magnhild Jacobsen, Anna Falkenberg. Fremst frá vinstru: Rosa Jacobsen, Rakul Biskupstøð, Súsanna Ludvig, Maria Guldborg Nielsen, Barbara Jeppesen, Eva Nagata, Christian Nagata, hjálparvenjari.*



**GENTUR 16 ÁR: KÍF**

**(vann 25-20, 25-23 á TB)**

*Aftast frá vinstru: Kristina Jacobsen, Kirstin Andreasen, Maria Hammer Matras, Jenny S. Wardum, Jákup Fjallsbak, venjari. Mittast frá vinstru: Malan Midjord, Iris Kirke, Elisabet Olsen, Johnvør Svavarsdóttir. Fremst frá vinstru: Bára Johannesen, Brita Djurhuus, Eyðrið Egholm Hansen, Anja Ivarsdóttir Ellendersen.*



**DREINGIR 14 ÁR: SÍ**

**(vann 25-21, 25-18 á Ternuni)**

*Aftast: Rajko Petrovic, venjari. Mittast frá vinstru: Brandur Leonson, Oskar í Haraldstovu, Ari Garaldsen, Kaper Lorentzen, Rúni Christiansen. Fremst frá vinstru: Teitur Anderson, Jákup Martin Weihe, Teitur Simonsen, Sjúrði Petersen.*



**DREINGIR 16: SÍ**

**(vann 18-25, 25-22 og 15-13 á TB)**

*Aftast frá vinstru: Niels Erik Andersen, Oskar Petersen, Ari Haraldssen, John O. Edvardson, Rajko Petrovic, venjari, Kaspar Lorentzen, Rúni Christiansen. Fremst frá vistru: Jákup Martin Weihe, Teitur Anderson, Brandur Leonson, Teitur Simonsen, Sjúrður Petersen.*



**MANSUNGLINGAR: TB/FLEYR A**

**(vann 25-17, 25-21 á TB/Fleyr B)**

*Aftast frá vinstru: Suni Yong Petersen, venjari, Fróði Bærentsen, Arthur Poulsen, Magnar Vang, Otto Gram, venjari. Mittast frá vinstru: Rói Hentze, Patrik Johannesen, Kjartan Johansen, Hugin Albinus. Fremst frá vinstru: Hávar Albinus, Tóki Justinussen, Bartal Gram, Bárður Dimon, Niklas Olsen.*



**KVINNUUNGLINGAR: MJØLNIR/ÍF**

**(vann 25-18, 21-25, 15-9 á TB)**

*Aftast frá vinstru: Urd Traðará, Sofía Purkhús, Hildur Magnadóttir, Marta Ákadóttir, Anna Maria Martinsdóttir, Jastrid Toftegaard, Kirstin Toftegaard. Fremst frá vinstru: Tóra Djurhuus, Jastrid Sivertsen, Poulina Øregaard, Svanna Jacobsen, Gudrun Vest.*